# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík

_________/_________ **Síða**

**Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig,skr.**

**Býráðsfundur hósdagin 27. november 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **14/00355**<br>**Umsókn um marknaumskipan til ummælis, matr. nr. 155, 156 og 157**<br>Málið var fyri í BOB tann 25.08.2014 og var samtykt soleiðis:<br>Hanus Jacobsen mælir til at umsøkjarin fær heimild at fremja marknaumskipan. Ólavur Olsen og Hanna Jensen mæla til at málið verður lýst nærri áðrenn støðutakan.<br><br>Tekniska umsitingin hevur tosað við m.a. Robert Thomasen um hetta málið og fundur hevur verið við umsøkjaran El-talvuvirkið.<br><br>Byggi- og býraskipanarnevndin mælir til at marknaumskipanin kann fremjast sambært umsókn. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 2. | **14/00390**<br>**Umsókn um keyp av matr. nr. 195a í Leirvík**<br>Edvard og Tóra á Hólalagnum biðja um ummæli frá kommununi at keypa matr. nr. 195a í er økið rundanum teirra matrikkul 215 í Leirvík, tað er Jarðarráðið/Búnaðarstovan sum eigur matr. nr. 195a. Matr. nr. 215 liggur farm við Bakkavegnum.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi tann 15.10.2014 at kommu-nan skipar fyri hoyring við grannar og málið verður lagt fyri byggi- og býraskipanarnevndina á fyrst komandi fundi. Fundur hevur verið við granna sum hevur hjall inni á jørðini sum skal keypast.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Edvard og Tóra á Hólalagnum kunnu keypa matr. nr. 195a ið er øki rundanum teirra matr. nr. 215 í Leirvík. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini. |

**Býráðsfundur hósdagin 27. november 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

**3. 14/00516**

**Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 264a og 16a i Leirvík til ummælis**

Jógvan Páll Kannuberg og Jonhard á Marknagarði skulu senda umsókn um marknaumskipan til Umhvørvisstovuna, men umsóknin verður fyrst send til Eysturkommunu til ummælis.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Jógvan Páll Kannuberg og Jonhard á Marknagarði kunnu fremja marknaumskipan sambært umsókn teirra.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**4. 12/00306**

**Útstykking í Syðrugøtu**

Í sambandi við útstykking av grundstykkjum í Syðrugøtu, verður verkætlanin lagt fram til viðmerkingar og útbjóðingarhátt.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at projektera alla byggibúningina og bjóða arbeiðstøkuna út í einum yvir 2 ár, 2015 og 2016. Projektið skal fevna um fylgjandi:

- Stødd á grundstykki um 600 $m^2$
- Hús kunnu í mesta lagi hava tvær hæddir, og hús við tveimum hæddum kunnu í mesta lagi hava, takhall upp til 30 stig.
- Hædd á húsum niðanfyri vegin og omanfyri vegin verða staðsett við fastari kotu í mun til vegin.
- Byggilinjur eru 5 metur
- Krøv til tíðarætlan
- Útbjóðingarháttur: Innboðin lisitatión

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**5. 14/00480**

**Umsókn um stuðul – Kris**

Talan er um eina umsókn frá KRIS, sum søkir um fíggjarligan stuðul til virksemi teirra og við serligum atliti til at hugsa verður um at víðka virksemi til miðstaðarøkið. Í dag hevur KRIS hølir í Eysturoynni.

KRIS fær í dag kr. 500.000 á fíggjarlóg landsins.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum trivnaðarnevndini um ikki at veita stuðul.

**Býráðsfundur hósdagin 27. november 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

Trivnaðarnevndin mælir frá at stuðla, men at umsóknin verður viðgjørd í býráðnum..

6. **14/00543**

**Avtala um tekniska ráðgeving av útstykking í Syðrugøtu**

Støðutakan til avtalu millum Eysturkommunu og Teknistovuna í Gøtu um tekniska ráðgeving viðv. Útstykking í Syðrugøtu

Fíggjarnevndin mælir til at góðtaka fyriliggjandi uppskot til avtalu.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

7. **14/00545**

**1.viðgerð av eykajáttanum 2014**

Gjøgnumgongd av rakstrinum higartil, vísir at neyðugt er við nøkrum eykajáttanum. Fíggingi til nakrar av hesum kunnu finnast innan verandi játtan, ímeðan neyðugt verður at fíggja nakrar av innistandandi. Harumframt verður er neyðugt at veita eykajáttan til løgukonto ***„Útstykkingar“***

Fíggjarnevndin mælir til at veita hesar eykajáttanir:

**Rakstrarjáttanir:**

100.000,00 kr á konto 2.20.23.510 (Tannrøkt) av innistandandi.

175.000,00 kr. á konto 2.21.72.510 (Forsorg) av konto 3.26.11.510-40 (Barnaansing)

200.000,00 kr. á konto 4.23.22.510 (Fólkaskúlin-Skúlaspírin) av konto 3.21.11.510 (Barnagarðar)

100.000,00 kr. á konto 6.11.31.510 (Ums. av fastognum – Kommunufjósið) av innistandandi.

150.000,00 kr. á konto 6.38.12.510 (Gøtuljós) av innistandandi

100.000,00 kr. á konto 6.38.13.510-10 (Maskinir og bilar) av innistandandi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

Eisini er samtykt at veita eina eykajáttan til konto 3.26.11.511 (Barnaansing, løgujáttan) á kr. 270.000,00, og peningurin verður tikin av innistandandi.

**Býráðsfundur hósdagin 27. november 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

240.000,00 kr. á konto 7.30.42.510 (Renovasjón) av innistandandi.

150.000,00 kr. á konto 7.31.11.510 (Sløkkiliðið) av innistandandi.

**Løgujáttanir:**
1.350.000,00 kr. á konto 6.22.11.510 (Byggibúning) av innistandandi.

**8. 14/00438**
**Mentanarpolitikkur hjá Eysturkommunu**
Støðutakna til uppskot um mentanarpolitikk í Eysturkommunu.

Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til mentanarpolitikk.

**9. 14/00438**
**2. viðgerð av fíggjarætlan 2015**
Ein minniluti í fíggjarnevndini, Jóhan Christiansen mælir til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið:

**Høvuðstøl:**

| | |
|---|---|
| Samlaðar rakstrarútr. | 55.003.000,00 |
| Samlaðar íløgur | 22.500.000,00 |
| Rentuútreiðslur | 2.231.000,00 |
| Samlaðar inntøkur | 71.648.000,00 |
| Avdráttir | 7.233.000,00 |

Skattaprosentið verður 21 og barnafrádrátturin verður 5.000,00 kr.

Samlaða úrslitið eftir rentir og avdrátt verður eitt hall á kr. 17.319.000,00, sum verður fíggjað við lántøku á kr. 10 mió og rest verður fíggjað av innistandandi.

Meirlutin, Brandur Jacobsen og Hjalti Dalheim taka ikki undir við uppskotinum, og koma við broytingaruppskoti/um til býráðsfundin.

Hjalti Dalheim og Brandur Jacobsen settu fram broytingaruppskot til fíggjarætlan, sum geva hesi høvuðstøl:

**Høvuðstøl:**

| | |
|---|---|
| Samlaðar rakstrarútr. | 55.003.000,00 |
| Samlaðar íløgur | 18.100.000,00 |
| Rentuútreiðslur | 2.231.000,00 |
| Samlaðar inntøkur | 71.648.000,00 |
| Avdráttir | 7.233.000,00 |

Skattaprosentið verður 21 og barnafrádrátturin verður 5.000,00 kr.

Samlaða úrslitið eftir rentir og avdrátt verður eitt hall á kr. 12.919.000,00, sum verður fíggjað við lántøku á kr. 10 mió og rest verður fíggjað av innistandandi.

Jóhan Christiansen, Oluffa Joensen, Ólavur Olsen og Árni Jacobsen settu fram broytingaruppskot til fíggjarætlan, sum geva hesi høvuðstøl:

**Høvuðstøl:**

| | |
|---|---|
| Samlaðar rakstrarútr. | 55.003.000,00 |
| Samlaðar íløgur | 19.500.000,00 |

**Býráðsfundur hósdagin 27. november 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

| | |
|---|---|
| Rentuútreiðslur | 2.231.000,00 |
| Samlaðar inntøkur | 71.648.000,00 |
| Avdráttir | 7.233.000,00 |

Skattaprosentið verður 21 og barnafrádrátturin verður 5.000,00 kr.

Samlaða úrslitið eftir rentir og avdrátt verður eitt hall á kr. 14.319.000,00, sum verður fíggjað við lántøku á kr. 10 mió og rest verður fíggjað av innistandandi.

Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskotið hjá Jóhan Christiansen, Oluffa Joensen, Ólavur Olsen og Árni Jacobsen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Oluffa Joensen, Ólavur Olsen og Árni Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen og Hanna Jensen

Sostatt er uppskotið falli

Síðani bleiv atkvøtt um broytingaruppskotið hjá Hjalta Dalheim og Brandur Jacobsen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen og Hanna Jensen

**Atkvøður ímóti:**
Ólavur Olsen, Árni Jacobsen og Oluffa Joensen.

Oluffa Joensen hevði tað viðmerking at hon ikki kann taka undir við uppskotinum, tí 1.5

**Býráðsfundur hósdagin 27. november 2014 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen

**Fundurin lokin kl. 23.30**

mió. kr. sum vóru avsettar á langtíðar fíggjarætlanini til Syðrugøtusand ikki allar eru avsettar til 2015.

Árni Jacobsen hevði tað viðmerking at hann kann ikki taka undir við uppskotinum tí íløgan í Lávusarhús ikki er við og íløgan til Brandstøð er minka til 100.000,00

**Atkvøddi blankt:**
Jóhan Christiansen

Sostatt er uppskotið samtykt.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________

Hanna Jensen ______________________

Hanus Jacobsen ______________________

Hjalti Dalheim ______________________

Árni Jacobsen ______________________

Oluffa Joensen ______________________

Brandur Jacobsen ______________________

Emma Rasmussen ______________________

Ólavur Olsen ______________________